# Stressið røkkur ik



*Fyrstu og neyvan síðstu ferð varð jólasølan í Ítróttar- og samkomuhøllini á Hálsi*

– Varmin, sum er inni í høllini, meðan jólasølan er nakað heilt serligt, og her inn røkkur stressið ikki, sigur Jórun Vang, sum er ein av limunum í Føroya Heimavirkisfelag, ið skipaði fyri árligu jólasøluni fyri tveimum vikum síðani

**JÓLASØLA**
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller*

Á hvørjum ári skipar Føroya Heimavirkisfelag fyri jólasølu fyri teirra limum. Í ár var hon næstseinasta vikuskifti, og var luttøkan metstór.

56 básar og 140 fólk, ið seldu teirra handgjørdu lutir. Bæði bundin og vovin pløgg, broderingar, seymað pløgg, smykkur, lutir úr jarni og timbri og í caféini var bara heimagjørdur matur at fáa.

– Tað er ein serligur hýrur til søluna, og hann ger, at løtan tú vitjar søluna, verður til nakað heilt serligt, sigur Jórun Vang.

Hon heldur, at jólasølan er eitt greitt tekin um, hvussu nógv dugnalig fólk eru í Føroyum.

– Tað er heilt fantastiskt at síggja alt, sum tey hava fingið frá hondini, og tey selja nógv, sigur hon.



*Í jólahýri á jólasølu*

## Flutt søluna

Fyri fyrstu ferð varð jólasølan hildin í ítróttarhøllini á Hálsi. Hon hevur annars hildið til í Gundadalshøllini í fleiri ár.

Alt byrjaði í Margarinfabrikkini fyri 12 árum síðani, tá sølan var á fyrsta sinni. Men sum Jórun sigur, er nógv hent á økinum síðani tað.

Í fjør vóru 34 básar, og tað var smekkfult í Gundadalshøllini. Í ár gjørdust fyrireikararnir skjótt greið yvir, at tann høllin ikki fór at kunna hýsa søluni í ár. So tey gjørdu av at flyta hana í ítróttarhøllina á Hálsi.

Jórun sigur, at tey stillaðu øðrvísi upp í ár til tess at fáa pláss fyri øllum. Tí umframt básarnar er eisini ein stór café, sum er eitt "must" til hendan dagin.

– Tað sosiala, sum fylgir við caféini er nakað, sum er við til at gera hendan dagin heilt serligan, sigur Jórun.

Í caféini fekst millum annað køkur, breyð við føroyskum viðskera, og sjálvandi var alt heimagjørt.

Jórun sigur, at summar familjur hava gjørt tað til ein sið at nýta ein part av einum vikuskifti til jólasøluna.

## Støðið hækkar

Jórun hevur verið við til at fyrireika jólasøluna, síðani hon byrjaði á Margarinfabrikkini fyri tólv árum síðani. Hon sigur, at støðið á handgjørdu lutunum er hækkað ótrúliga nógv.

– Tað er eitt einastandandi flott handverk, sum verður stillað fram til jólasøluna. Tað verður flottari fyri hvørt ár, so tað er sera hugaligt at skipa fyri hesum, sigur hon.

Tey, ið stilla fram og selja, eru í øllum aldri. Blaðung fólk og fólk, sum eru farin um tey áttati. Tað ger, at sølan er sera fjølbroytt og er okkurt fyri øll.

Jórun sigur, at tað er stuttligt at síggja, hvussu skapanarhugurin og evnini hjá ungdóminum til føroyskt handverk er mentur seinnu árini.

– Frá at vera næstan null, stendur hann í fagrasta blóma nú, sigur Jórun, sum varð fullkomuliga bergtikin av øllum tí, sum tey ungu komu við til jólasøluna.

Hon greiðir frá, at í dag vilja ungar gentur aftur læra seg at binda. Hon minnist afturá, tá ommurnar plagdu at læra frá sær.

Jórun leggur dent á, at tað at duga at binda er ein gáva, sum fólk hava fingið. Hon heldur fram, at tað er vísundaliga prógvað, at tað er gott fyri ein sálarliga at binda. Eitt slag av meditatión samanber hon tað við.

– Tað er ótrúligt, hvussu dugnalig vit føroyingar eru. Vit síggja tað bara ikki sjálvi, og tað er spell, heldur Jórun, sum hevur vitjað nógvar handverksframsýningar í útlondunum. Hon heldur ikki, at føroyingar standa petti aftan fyri útlendingarnar.

– Hetta er ein dýrgripur, sum vit hava, og hann má fyri alt í verðini ikki detta burtur, sigur Jórun.